# Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

Til
Fjølmiðlarnar

Tórshavn, 26. mars 2009
J. nr.: -/-
Viðgjørt: PW/roja

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur síðan 1989 kannað hugburð, atburð og vitan viðvíkjandi m.a. rúsevnum hjá næmingunum í 9. flokki. Henda kanning er gjørd saman við frá 30 til 35 londum í Evropa í árunum 1995, 1999, 2003. Seinasta kanningin fór fram á vári 2007. Tilfarið er nú skrivað saman í bók, sum verður almannakunngjørd í øllum londunum í dag, 26 mars 2009. Fólkaheilusráðið hevur stuðlað peningarliga.

## Um kanningina 2007 er stutt at siga:

Í døgunum 16.–30. mars (tveir skúlar, ávikavist 1. og 2. mai) varð heitt á allar næmingar í 9. flokki (38 flokkar í 18 skúlum) um at svara einum spurnablaði. Í alt 630, ella 81% av næmingunum, svaraðu spurningunum. Her skulu vit siga frá nøkrum av meginúrslitunum.

**<u>Tubbaksroyking:</u>**

1 21,2% (33,6% í 2003) av dreingjunum og 21,6% (33,2% í 2003) av gentunum søgdu seg at hava roykt dagliga seinastu 30 dagarnar
2 11,6% (21% í 2003) av øllum næmingunum søgdu seg roykja dagliga, longu tá teir vóru 13 ára gamlir ella yngri
3 32,7% (47% í 2003) høvdu roykt onkuntíð seinastu 30 dagarnar

Brúka vit nakrar av undanfarnu kanningum til samanberingar, síggja vit, at royking nú er minni enn nakrantíð millum hesi 15 ára gomlu: Í 1996 roykdu 39% dagliga, í 1997 37%, í 1998 30%, í 1999 28%, í 2003 33% og 2007 21%. Her hava vit øll árini brúkt sama spurning: ”Hvussu ofta hevur tú roykt sigarettir seinastu 30 dagarnar?”. Síðani eru hesir valmøguleikarnir lagdir saman:

- 1-5 sigarettir um dagin
- 6-10 sigarettir um dagin
- 11-20 sigarettir um dagin
- Meira enn 20 sigarettir um dagin

**<u>Rúsdrekka:</u>**

- Seinastu 30 dagarnar søgdu 48% av næmingunum seg ikki hava smakkað rúsdrekka. Til samanberingar var hetta tal 38% í 2003.
- Seinastu 30 dagarnar høvdu 12,5% drukkið seg fullan. Í 2003 var hetta tal 43%, men tá spurdu vit øðrvísi. Í 2003 spurdu vit: “*Hvussu ofta hevur tú drukkið teg fulla/n av rúsdrekka*”. Tað er tó ymiskt, hvat fólk leggja í at vera “fullur”, so í 2007 spurdu vit neyvari: “*Hvussu ofta hevur tú verið so ávirkað/ur av rúsdrekka, at tú hevur vinglað, havt trupulleikar at tosa, spýð ella ikki minst til, hvat ið hendi*”.

**Sjúkrahúsverk Føroya**
**Sigmundargøta 5, Postsmoga 14, FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: +298 31 66 96, Fax: +298 31 97 08, T-postur: dfaa@health.fo**

Í okkara spurnablaði er tíverri villa komin í spurning 11, og tí hevur verið trupult at samanbera henda spurning við hini londini, og tað sæst aftur i onkrum av tabellunum í ESPAD bókini:

**11** ***Hvussu ofta hevur tú smakkað rúsdrekka?***

*(Set ein kross á hvørja reglu)*

| | *Ongantíð* | *1–2 ferðir* | *3–5 ferðir* | *6–9 ferðir* | *10–19 ferðir* | *20–39 ferðir* | *40 ferðir ella meira* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *a) Tað stóð "Øl", men tað skuldi standa "Í lívinum"* | 15,9 | 14,4 | 9,7 | 8,7 | 10,0 | 12,5 | 28,4 |
| *b) Tað stóð "Vín" , men tað skuldi standa "Teir seinastu 12 mánaðirnar"* | 21,4 | 27,5 | 19,5 | 13,8 | 7,0 | 3,8 | 4,6 |
| *c) Tað stóð "Brennivín" , men tað skuldi standa "Teir seinastu 30 dagarnar"* | 26,2 | 11,0 | 7,8 | 5,6 | 12,2 | 10,6 | 25,2 |
| | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 |

**Hassj**:

- Seinastu 30 dagarnar søgdu 1,3% av næmingunum seg hava roynt hassj. Hetta tal var í 2003 1,4%.

**Sniffað**:

- Seinastu 30 dagarnar høvdu 1,3% sniffað, t.d. lím og tendraragass. Í 2003 1,9%.

**Rúsevni annars í lívinum:**

| | **2007** | **2003** |
|---|---|---|
| • Amfetamin: | 0,6% | 0,5% |
| • LSD: | 0,6% | 1,0% |
| • Crack: | 0,6% | 0,5% |
| • Kokain: | 0,9% | 0,7% |
| • Heroin: | 0,6% | 0,8% |
| • Ecstasy: | 0,8% | 1,4% |
| • Soppar: | 0,6% | 1,5% |

Tølini omanfyri eru á leið tey somu sum í 2003.

Kanningin er løgd soleiðis til rættis, at tað ber til at samanbera úrslitini heima hjá okkum við umleið 35 lond í Evropa. ESPAD frágreiðingin er at fáa á heimasíðuni www.espad.org – hon er eisini viðheft her sum pdf-skjal. Viðheft er eisini føroyska spurnablaðið, har vit hava sett inn svørini í prosentum av øllum 630, sum svaraðu. Tað er eisini at finna á heimasíðu okkara, www.health.fo.

Vinarliga

Pál Weihe
yvirlækni